# Dagbókin

**Nú fara vit at endurgeva brot úr dagbókini hjá Egil. Í summum førum verður endurgivið orðarætt. Í øðrum førum verður gjørdur samandráttur. Sum tørvur er á verða gjørdar frágreiðingar. Eisini verða roynt eftir førimuni at lýsa persónarnar, sum koma fyri í dagbókini**



*Mamman, Hulda, tók ímóti Egili, tá ið hann kom til Keypmannahavn. Her sæst hon saman við Egili í Føroyum. Helst í 1916*

skjótt sum



*Faktorin Johan Christian Djurhuus, abbi Egil. Meðan hann virkaði í Klaksvík trýfaldaðist fólkatalið frá um 180 til um 530. Húsatalið fór frá 28 upp í um 100*



*Magdalena var elsta barn hjá Faktorinum. Hon giftist ikki og var "heima", so leingi hon livdi*

hetta.

## Um dagbókina

Dagbókin er í tveimum. Fyrri partur byrjar í Danmark, hagar Egil er farin at fáa sjúkraviðgerð. Sum tað skilst seinni í dagbókini, er hann farin úr Føroyum 15. november, so tað hevur verið ein longri ferð.

Dagbókin er í tveimum protokolbókum. Helst man hann hava keypt ta fyrru, tá ið hann er komin til Keypmannahavnar.

Egil greiðir gjølla frá teimum persónum, sum hann hittir í Danmark. Tað áhugaverda er, at millum hesi eru mamman, omman, mammubeiggi og helst onnur í móðurættini. Hetta merkir, at tey hava havt samband millum sín, hóast Egil neyvan kann minnast mammu sína sum mammu. Hann var lítil, tá ið foreldrini fóru frá hvørjum øðrum.

Men tað eru eisini ábendingar um, at mamman hevur verið í Føroyum aftur. Maria Djurhuus (í barnagarðinum) í Havn eigur tær flestu av teimum myndum, sum eru av Egil í hesi greinarøð. Á einari er hann saman við mammuni, og henda myndin er tikin av Turid Jacobsen í Havn.

## Vinarlag við Lützenættina

Men tað sum er eins áhugavert er, at ein av teimum sum tekur ímóti Egil í Keypmannahavn er Ove Lützen, og hann er eisini um Egil ta tíðina, hann er í Danmark.

Hetta er ein partur av søguni um, hvussu nær Faktorin kom teimum, sum hann arbeiddi saman við.

Ove Lützen var sonur Henriettu, dóttir gamla Restorff, og Jacob Lützen, sum var sonur tann A.C. Lützen, sum var fyrsti Lützen í Føroyum. Tað var hann, sum datt deyður niður, tá ið hann talaði fyri kongi í 1874.

Ein beiggi Jacob var Nichels Lützen (1843-1912). Hann kom 15 ára gamal til Klaksvíkar saman við Faktorinum í 1858.

Teir báðir sótu væl um sátt, og sum árini gingu gjørdist Nichels høgra hond hjá Faktorinum. Nichels var eisini gubbi fyrsta barninum hjá teimum, Magdalenu. Tá ið Faktorin leggur frá sær í 1908 tekur Nichels við.

Tað skilst eisini á teimum, sum seinni vitja Egil í Føroyum, at tað hevur verið eitt tætt vinarlag við Lützenættina, og hetta hevur so eisini verið galdandi fyri Ova, sum er búsettur í Danmark.

Ove var føddur 8/3-1885. Hann giftist 21/7-1918 í Vor Frue kirke við Edith Louise Andersen, fødd 28/6-1891. Hon var dóttir postmeistaran Andersen. Sum ungur var hann ein av stigtakarunum til Havnar Fimleikarafelag og var sjálvur ein góður fimleikari. Í Danmark, har hann kom at búgva mestu tíðina av ævi síni, starvaðist hann sum heilsølumaður, og sum slíkur seldi hann nógvar ymiskar vørur til Føroyar.

Johan Restorff Jacobsen, sum er keldan til hesar upplýsingar greiðir frá, at tey árini pápi hansara Andreas handlaði við kolonialvøru í Vágsbotni, keypti hann nógv frá Ova Lützen. Hann hevur óivað saman við bróðurinum gjørt sítt til, at Andreas kundi ogna sær sín part av handilsfyritøkuni í Vágsbotni.

Í hesum sambandi var Johan eina ferð úti hjá Ova Lützen í Gentofte og rindaði honum pening fyri vørur, sum Andreas hevði keypt frá honum.

Ove doyði tann 15/3-1969 og Edith Louise tann 11/3-1953 og eru bæði jarðaði í Gentofte kirkjugarði. Tey áttu trý børn.



Dagbog I

Kjøbenhavn d. 1 December 1916

Kl. 9 om Morgenen begyndte vi at sejle ...

Den 2 December

*Byrjanin á dagbókini*

## Kjøbenhavn d. 1. December 1916

Kl. 9 om Morgenen begyndte vi at sejle ind til Kjøbenhavn. Det var meget pænt Vejr, men meget koldt. Ved 10 Tiden var vi inde ved Kajen. Ved Indsejlingen passerede vi Botnia, der skulde op til Færøerne.

Ombord i den var Jacob Lützen, Frants Restorff, (sonur Gamla Restorff), Maja Restorff, (dóttir hansara), Knud Lützen, (pápi m.o. Esther Djurhuus), m.fl.

Vi fik lige hilst paa hinanden og fik paa den Maade en Hilsen med Hjem. Da vi lagde ind til Kajen kom Moder og Carl Müller og tog imod mig, ligesaa Ove Lützen. Ellers var der en del færinger til stede: Joen Mikkelsen, Sanna Niclassen, Ingrid Lützen (systir Ova) m.f.

Jeg kørte siden med Moder i Bil hjem til Onkel Chr. Da vi saa havde faaet anbragt Bagagen, kørte vi i Sporvogn hjem til Bedstemoder. Moder gik siden hen paa Kontoret igen. Jeg blev saa hos Bedstemoder, til Moder kom og hentede mig. Vi kørte saa hjem til Onkel Chr. igen, hvor vi spiste til Middag sammen med fru Hofmann. Ved kl. 10-tiden tog Moder hjem og jeg gik i Seng. Paa den Maade tilbragte jeg min første dag i København.

## 2. December

Da jeg havde spist Frokost gik jeg en lille Spadseretur op og ned ad Vesterbrogade. Jeg turde ikke at vove mig saa langt i de første par Dage. Moder kørte siden med mig ud til Bedstemoder, hvor vi spiste Middag. Hun fulgte mig ligeledes hjem om Aftenen, efter at vi havde set et Stykke i Kinografen.

## 3. December

Da jeg havde drukket The, røg jeg mig en lille Cerut og læste i Aviserne. Hilste paa Edith første gang "eitt ógvuliga fitt systkinabarn og óføra blíð". Vi sad saa og passiarede indtil vi skulde spise Frokost. Vi skulde spise kl. 12, og da Fru Hoffmann og Moder var kommet spiste vi. Efter Frokosten spadserede Moder og jeg ned ad Strøget. Siden tog vi hjem til Bedstemoder,